**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Úttøkuskipan til HMS 2024 í Budapest

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til HeimsMeistarastevnuna á stuttgeil 2024, sum verður í Budapest í Ungarn frá 10. til 15. desember 2024.

Sjálvar kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av World Aquatics, sí https://www.worldaquatics.com/competitions/3433/world-aquatics-swimming-championships-25m-2024

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans ein luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein. Gevið gætur at hesar skulu klárast á serliga AQUA-góðkendum stevnum, sí lista umvegis leinkið omanfyri.

Reglur AQUA loyva hartil at vit kunnu taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn. Hesir eyka svimjarar kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum, og væl at merkja ikki í somu grein sum nakar annar av okkara.

Um trupulleiki er við ov nógvum svimjarum til somu grein, so verður skjótasti svimjari úttikin.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2024.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. september 2024.

Úttøka av juniorum kann upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð. Gevið tó gætur, at AQUA hevur ásett minstaaldur á 14 ár fyri luttakarar á sínum meistarastevnum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. sep. 2023 til og við 10. nov. 2024 (til og við FMS/JMS 2024)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá AQUA.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Kravtíðir til HMS í Budapest 2024

At klára á stuttgeilastevnum góðkendar av AQUA sum úttøkustevnur til HMS 2024

| Kravtíðir - Kvinnur | | | Kravtíðir - Menn | |
|---|---|---|---|---|
| **B - 1 svimjari** | **A - 2 svimjarar** | | **A - 2 svimjarar** | **B - 1 svimjari** |
| 0:25.30 | 0:24.44 | **50 frí** | 0:21.40 | 0:22.15 |
| 0:55.66 | 0:53.78 | **100 frí** | 0:47.23 | 0:48.88 |
| 1:59.65 | 1:55.60 | **200 frí** | 1:44.88 | 1:47.72 |
| 4:15.59 | 4:06.95 | **400 frí** | 3:42.50 | 3:50.29 |
| 8:46.99 | 8:29.17 | **800 frí** | 7:45.02 | 8:01.30 |
| 16:49.40 | 16:15.27 | **1500 frí** | 14:49.29 | 15:20.42 |
| 0:27.47 | 0:26.54 | **50 rygg** | 0:23.38 | 0:24.20 |
| 1:00.11 | 0:58.08 | **100 rygg** | 0:51.30 | 0:53.10 |
| 2:09.93 | 2:05.54 | **200 rygg** | 1:52.66 | 1:56.60 |
| 0:31.52 | 0:30.45 | **50 bringa** | 0:26.57 | 0:27.50 |
| 1:07.56 | 1:05.28 | **100 bringa** | 0:57.63 | 0:59.65 |
| 2:28.40 | 2:23.38 | **200 bringa** | 2:06.23 | 2:10.65 |
| 0:26.72 | 0:25.82 | **50 fírvald** | 0:22.53 | 0:23.32 |
| 0:59.41 | 0:57.40 | **100 fírvald** | 0:50.57 | 0:52.34 |
| 2:13.36 | 2:08.85 | **200 fírvald** | 1:53.61 | 1:57.59 |
| 1:01.74 | 0:59.65 | **100 blandað** | 0:52.98 | 0:54.83 |
| 2:14.72 | 2:10.16 | **200 blandað** | 1:55.25 | 1:59.28 |
| 4:47.25 | 4:37.54 | **400 blandað** | 4:09.19 | 4:17.91 |

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum, og fyri miskiljingum í mun til treytirnar frá AQUA

ATLANTIC AIRWAYS